## Punkurin undir nálina




*Plátuhúsin til Viva La Republica er nýgjørdur, og sostatt ikki eitt beinleiðis kopi av fløguhúsanum*

**Nógv ár eru liðin síðan seinasta føroyska LP-plátan kom út, men nú kemur aftur nýtt føroyskt undir nálina, tá ein av mest seldu fløgunum í ár "Viva La Republica" hjá 200 kemur út á LP**

**TÓNLEIKAÚTGÁVA**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Punkbólkurin 200 almannakunngjørdi her fyri, at bólkurin fór at geva báðar fløgurnar hjá sær út á LP. Í vikuni fer nýggjara fløgan Viva La Republica til skeringar, og hon verður væntandi at fáa um ársskiftið ella kanska enntá áðrenn jól. Á heimasíðuni www.tveyhundrad.net ber til at skriva seg upp á bíðilista til LP'ina

Einans 250 LP'ir verða gjørdar í hesum umfarinum. Niels Arge Galán sangari í 200 sigur, at bólkurin onga hóming hevur av hvør áhugin fyri LP'ini verður. Tí hava teir valt bert at gera 250 LP'ir, sum er minstamark.

LP'in fær ein nýggjan húsa í mun til fløguna. Tónleikurin er hin sami, men ljóðið til LP'ina er remastrað við dupult so høgari góðsku sum á fløguni, so talan verður um krás til oyrað og eygað. Sostatt verður eitt sindur gjørt burtur út plátuni. Hetta er ikki bara ein fløga, sum verður løgd á plátu. Her er talan um nýggja útsjónd og betri ljóð.

Niels, sum til dagligt virkar sum listarligur leiðari á ReproZ, sigur við Planet.fo, at hetta at gera ein LP húsa er ein gamal dreymur. Niels og trummuleikarin Uni Árting, hava kollvelt fløguhúsaídnaðin í Føroyum seinastu árini og vunnu sera uppiborðið AME virðislønina fyri besta fløguhúsa fyri júst Viva La Republica. Men tá Niels og Uni byrjaðu at gera húsar vóru føroyskir bólkar givnir at gera LP'ir. Tí er hetta fyrsta høvið hjá teimum, at gera eina LP.

# Flaggsøgan Merkið í triðju og øktari útgávu

**Flaggsøgan Merkið eftir Niels Juel Arge er komin út í nýggjari og øktari útgávu. Hetta er ein snotilig útgáva av eini virðiligari søgu**

**FLAGGSØGAN**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Flaggsøgan hjá Niels Juel Arge, sum kom út út fyri 25 árum síðani, hevur ikki verið at fingið leingi.

Søgan er so mikið áhugaverd og týdningarmikil, at vit hava hildi, at tað er ómakin vert at geva hana útaftur, sigur forlagið Tjarnardeild, sum nú hevur givið útaftur hesa spennandi og hugvekjandi bók um stríðið fyri viðurkenning av føroyskum flaggi.

Flaggsøgan kom út í 1980, og var hetta áðrenn Niels Juel Arge fór undir bókaverkið »Stríðsárini 1-6«, sum kom út árini 1985-90.

Meðan bøkurnar um stríðsárini vórðu fyrireikaðar, varð um hersetingarárini 1940-45, skrivar forlagið í innganginum til bókini.

Tað sømdi seg ikki, at ein tjóð ikki kundi siga frá sorg ella gleði við sínum egna merki, hildu studentarnar í Keypmannahavn í 1919. Teir settu sær fyri at gera uppskot til føroyskt tjóðflagg.

Merkið veittraði fyrstu ferð sama árið. Tað sást fyrstu ferð á báti í 1920. Í 1923 veittraði tað fyrstu ferð á føroyskum fiskiskipi, og føroyskir skiparar sigldu skjótt bert undir Merkinum, men tað kostaði teimum rættindi.

Á altingshátíðini á Tingvøllum í 1930 kravdi og fekk danski forsætisráðharrin føroyska flaggið strikað. Á Tinghúsvøllinum í Havn rópti amtmaðurin: »Tag den klud bort«, tá Páll í Kirkjubø hongdi Merkið út av einum loftsvindeyga í tinghúsinum 900 ára dagin fyri falli Ólavs kongs.

Tað kom rættiliga til skarpskeringar í 1940. Bretska hersetingarvaldið vildi ikki lata føroyingar sigla undir donskum flaggi, men amtmaðurin kravdi, at teir skuldu. Føroyingar sjálvir aftraðu seg.

Eftir miklan gleim í landsnevndini og í havnargøtum avgjørdu bretskir myndugleikar tann 25. apríl, at føroyingar skuldu sigla undir Merkinum. Tað var hátíðardagur í Føroyum.

Alt hetta og nógv aftrat kann lesast í flaggsøguni Merkinum, sum í bókabúðunum kostar 299 krónur.



*Páll Patursson heingir flaggið út aðru ferð út av loftsvindeyganum á tinghúsloftinum. politiið er komið eftir honum*

**FAKTA**

**Triðja økta útgáva**

Høvundur: Niels Juel Arge
Útgáva: ForlagiðTjarnardeild
Ritstjórn: Jógvan Arge
Prent: Føroyaprent
Tekningar: Tummas Mikael Smith, Bibi Haraldsen og Óli Petersen
Perma: Oskar Hermansson
Nógvar góðar myndir úr flaggsøguni
Síðutal 208
Prísur 299 kr.

# Palliativa toymið fer til verka 1. desember

**Palliativa toymið á skal arbeiða fyri, at ólekiliga sjúkir krabbameinssjúklingar skulu hava møguleika at uppliva teirra seinastu tíð í tí umhvørvi, sum teir sjálvir ynskja – tað verði seg á sjúkrahúsi, røktarheimi ella í teirra egna heimi**

**KRABBAMEIN**

Serførleiki innan palliativa viðgerð og røkt er nú savnað í eitt toymi, sum fer undir virksemi sítt 1. desember. Orðið palliatión merkir umsorgan og linnandi viðgerð, og endamálið við toyminum er at veita álvarsamt og ólekiliga sjúkum krabbameinssjúklingum linnandi røkt og viðgerð, umframt stuðul av øðrum slag við tí í hyggju at bøta um lívsdygdina hjá bæði sjúklingum og avvarðandi teirra.

Palliativa toymið er sett saman av læknum, sjúkrarøktarfrøðingum, sálarfrøðingi, fysioterapeuti og sosialráðgeva og hevur harumframt tætt samband aðrar førleikar áLandssjúkrahúsinum.Toymið samstarvar við kommunulæknar, heimarøktina og tey trý sjúkrahúsini í landinum.

Sjúklingar, sum hava ólekiliga krabbameinssjúku kunnu verða knýttir at palliativa toyminum eftir ávísing frá egnum lækna ella frá eini sjúkrahúsdeild. Í sambandi við at palliativa toymið fer til verka, hevur Landssjúkrahúsið latið gjørt ein faldara, ið er ætlaður sjúklingum og avvarðandi teirra at kunna seg nærri um palliativa toymið og tilboð tess. Faldarin liggur frammi hjá kommunulæknum og á sjúkrahúsunum.

Tað var táverandi landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, sum í oktober 2000 setti ein arbeiðsbólk at gera eitt uppskot til hvussu palliativ viðgerð kundi skipast í Føroyum, og eitt av uppskotunum var at seta á stovn eitt palliativt toymi. Í ár var peningur fyri fyrstu ferð settur av til at reka hetta toymið.

Palliativa toymið virkar toriinum á Landssjúkrahúsinum.

**FAKTA**

**Palliativ umsorgan verður lýst soleiðis sambært WHO:**

ásannar lívið og sær deyðan sum eina natúrliga gongd
hvørki framskundar ella útsetir deyðan
linnar um pínu og onnur sjúkueyðkenni
sameinir umsorganina fyri tí sálarliga og tí andaliga
bjóðar sjúklingunum stuðul at liva virkin, sum umstøðurnar nú
loyva, fram til deyðan bjóðar familjuni stuðul undir sjúkraleguni og aftaná í sambandi við sorgina